

# Statoil flytur oljufólk av Snorre A palli eftir leka

**Jan Müller**

19.01.2014 - 19:03

Oljan.fo

**Norska Statoil hevur í løtuni trupulleikar við einum brunni á Snorre A pallinum í Norðsjónum. Umleið 117 av teimum 254 fólkunum umborð eru flutt yvir á aðrar pallar í grannalagnum.**

Hegnar Online skrivar, at Statoil brúkti tvær tyrlur til at flyta oljufólkini yvir á Gullfaks A og C, sum liggja 10 til 15 minuttir burturi. Talan var um eitt fyribyrgjandi tiltak og ikki um eina veruliga evakuering sigur umboð fyri Statoil.

Trupulleikin er, at boritilfar er likið úr brunninum, á meira enn 5000 metra dýpi um somu tíð, sum vánaligt veður er í økinum.

Sum skilst er støðan ikki álvarslig og eru viðurskiftini við at koma uppá pláss aftur.

Í ringasta føri kann talan vera um at koyra betong í brunnin.

Snorre A pallurin liggur í Tampen-økinum í Norðsjónum. 160 fjórðingar vestan fyri Florø. Snorre keldan hevur framleitt olju og gass síðani august 1992. Talan er um ein pall við bústøðum og til boring og framleiðslu.

Nógvir føroyingar arbeiða í norsku oljuvinnuni. Tað er ógreitt, um føroyingar eisini eru við á hesum pallinum ella á skipum nærhendis